# Løgdu sannførandi fyri í Íslandi

**U 17 landsliðið megnaði at svara aftur, eftir at Svøríki miðskeiðis í 2. hálvleiki hevði lagt seg á odda. Liðformaðurin á føroyska liðnum javnaði við framúr langskoti úr stórari fjarstøðu**

U 17 NM

*Jóannes Hansen*



*Føroyska U 17 fótbóltslandsliðið, sum týsdagin megnaði 1-1 móti Svøriki*

Tíðin tykist vera farin, tá ið føroyingar hvørja ferð og í øllum dystunum í altjóða ungdómskappingum í fótbólti leggja rygg til stórtap.

Síðsta dømi um hetta var seinnapartin týsdagin, tá ið U 17 landsliðið í fyrsta dystinum í NM kappingini, sum í hesi vikuni er í Reykjavík, megnaði 1-1 móti Svøríki. Svensku spælararnir vóru ógvuliga vónbrotnir, tá ið dómarin bríkslaði fyri síðstu ferð eftir 80 minuttir og fýra minuttir yvirtíð. Svøríki hevði fram móti dystarenda fríspark í føroyska brotsteiginum, men tað eydnaðist ikki at fáa mál.

Føroyski málskjúttin var liðformaðurin og miðvallarin úr VB, Henning Joensen, sum við dundur langskoti úr 35-40 metrum tíggju minuttir undan leikloki sendi upp um stóra og eitt vet uttarlaga stadda svenska málverjan, eftir at hann hevði vunnið bóltin av mótstøðumonnunum og drigið eitt sindur við honum.



*Liðformaðurin, Henning Joensen, VB, skoraði føroyska málið úr næstan 40 metra fjarstøðu*

Fagnaðurin í føroysku leguni var stórur yvir javnleikin og málið, sum tað varð tosað nógv um. Seinnapartin í gjár skuldu føroysku unglingarnir spæla móti Onglandi, sum týsdagin vann 3-2 á Finnlandi, eftir at Finnland í steðginum hevði verið frammanfyri 1-0. Ongland skoraði øll trý málini eftir tíggju minuttum í 2. hálvleiki. Georg N.Rasmussen dømdi henda dystin.

Úr Íslandi frættist, at føroyska liðið var væl skipað. Spælbýtið var 75-25 til sviar. Men Svøríki megnaði ikki at spæla seg til upplagdar málmøguleikar. Teir høvdu nógv hornaspørk, men bara tvær ferðir vóru teir heilt vandamiklir, og tá var Jóan Pauli í føroyska málinum sannur brandur. Tá ið Svøríki legði seg framum í 62. minutti, royndu føroyingarnir at sparka burtur, men bólturin rakti í mótstøðumann og stakk so leysur í brotsteiginum. Jóan Pauli hálvbjargaði í fyrru atløgu, men mótstøðumenninir vóru fyrstir á returbóltinum.

Skoðsmálið, sum føroysku spælararnir fáa, er, at talan var um liðavrik, har allir arbeiddu støðugt og bakkaðu væl upp. Tað var tætt millum keturnar. Verjan var ansin, miðvallararnir arbeiddu skilagott, og í einstøkum førum eydnaðist at fara í mótálop. Teir, sum vórðu skiftir inn, komu beinanvegin fyri seg. Men tað var bara framúr skotið hjá Henningi, sum endaði í málinum.

Hósdagurin og leygardagurin eru frídagar. Føroyar skulu fríggjadagin spæla móti Finnlandi, og sunnudagin fer at verða spælt um endaligu plaseringarnar. Í hinum bólkinum vann Danmark týsdagin 4-0 á Íslandi, og Írland vann 3-2 á Noregi.

Føroyska liðið: Jóan Pauli Jakobsen, B36 - Rúnar L. Jacobsen, B36 (John Hammer, KÍ, 51.), Ari Samson, KÍ, Torkil Kollsker, HB, Heri Nesá, ÍF - Rasmus Nielsen, B71 (Álvur Christiansen, KÍ, 41.), Filip Jacobsen, NSÍ, Henning Joensen, liðformaður, VB (Eli Simonsen, KÍ, 72.), Rógvi Poulsen, AB - Johan Ellingsgaard, B36 (Rógvi Holm, AB, 79.) - Klæmint A. Olsen, NSÍ (Vincent Jacobsen, ÍF, 65.)

Á beinkinum uttan at verða skiftir inn vóru Hans Jørgensen, KÍ, og Martin Tausen, VB. Pætur Clementsen er venjari, og Finn Johannesen er hjálparvenjari. Andrass K. Thomassen er liðleiðari, Fanny Kruse fysioterapeutur og Rúni Heinesen er ferðaleiðari.

## Massa koyrir fyri Ferrari næsta kappingarár

FORMEL 1

*Niels Uni Dam*

Brasilianski formel 1 koyrarin Felipe Massa almannakunngjørdi í dag, at hann næsta kappingarár koyrir fyri Ferrari. Hann segði seg verða sera erpnan av at sleppa at koyra fyri stórliðið við liðuna av heimsins besta bilførara, hetta skrivar www.pole-position.dk í dag. Hetta merkir, at landsmaður hansara Rubens Barrichello ikki koyrir fyri Ferrari næsta kappingarár.

Felipe Massa koyrir í løtuni á triðja árið fyri Sauber. Hann kom til Sauber liðið aftan á eitt ár, sum royndarkoyrari hjá Ferrari, og øll árini hava leysasøgur gingið um, at Sauber setrið var venjing til eitt Ferrari setur. Sauber brúka Ferrari motorar. Nú er Sauber liðið selt til BMW og byrjar, sum eitt reint BMW lið næsta kappingarár.

Hvar Rubens Barrichello fer er ilt at siga, hann hevur í ár verið sera opinskáraður í sínum atfinningum móti sjey falda heimsmeistaranum Michael Schumacher, harafturat hevur hann ikki havt nakað serligt kappingarár. Í løtuni eru nógvar leysasøgur um Barrichello, men flestu teirra senda hann til BAR-Honda, sum sigast at vera sera ónøgd við teirra japanska bilførara Takuma Sato.

## Nú styttist til Regatta siglingina

SIGLING

*Tíðindaskriv*



Hósvíkar Róðrarfelag skipar aftur í á fyri árligu Regatta siglingini av Eiði til Hósvíkar.

Fríggjadagin tann 12. august verður siglt av Eiði til Hósvíkar, har fólk fá ein bita at eta og annars hugna sær. Dansur verður í bygdarhúsinum fríggjakvøldið har LM-band spælir.

Leygardagin verður sum vanligt er, sett kós til Nólsoyar á Ovastevnu.

Lýst verður seinni um tíðir og tilmelding.